TAKS

## Orðalisti

**Fakskipan**
Tá tosað verður um fakskipanir, so verður meint við serligar skipanir, so sum skattaskipan, tollskipan, rentustuðulsskipan og aðrar. Tað vil siga KT-skipanir, sum eru serliga gjørdar til at loysa ítøkiligar uppgávur út frá galdandi lógum, og sum ikki kunnu keypast sum standardskipanir.

**Migrering**
Tað merkir (í hesum førinum) at flyta dátur, forrit og annað frá einum gomlum KT-palli á ein nýggjan og meira tíðarhóskandi KT-pall. Tá talan er um, at hetta verður gjørt 1 til 1, so er ikki talan um nakra nútíðargerð av forritum, og eingin broyting er í, hvussu skipanin virkar.

**Servicegrundaður arkitekturur**
Tað merkir, at skipanir ella forrit eru deild sundur í sjálvstøðugar eindir, sum síðani samskifta sínámillum, og sum eisini kunnu endurnýtast uppá tvørs. Hetta skapar ein nógv størri fleksibilitet, og er lættari í mun til framtíðar broytingar. Hetta er tað øvuta av støðuni í dag, har meginparturin er flættaður saman og viðbrekin.

**API**
API stendur fyri Application Programming Interface. API'ir virka sum brýr ímillum ymiskar KT-skipanir og loyva flutningi av dátum á ein skipaðan hátt.

**Low-code menningaramboð (OutSystems)**
Low-code er ein menningarháttur, har brúk av visuellum markamótum og toga- og slepp møguleikum minka um tørvin á siðbundnari forritan. Hetta skapar eisini møguleikar fyri, at KT-menningin ikki longur krevur so djúpa vitan og royndir, sum siðbundin forritan, og hetta skapar aftur fleksibilitet. OutSystems er eitt av hesum menningaramboðunum, og Talgildu Føroyar brúka eisini OutSystems.

**Framtíðartryggjan**
Við framtíðartryggjan verður meint, at KT-skipanirnar ómakaleyst kunnu virka nógv ár framyvir. Elsti parturin av núverandi tøknini hevur virkað í umleið 40 ár, sum er rættiliga leingi í KT-høpi. Tá talan er um framtíðartryggjan, so verða skipanirnar nú gjørdar soleiðis, at tær leypandi kunnu viðlíkahaldast og mennast, soleiðis at man varðveitir ein framtíðartryggjaðan KT-pall, har menningarorka, KT-mennarar, er tøk framyvir. Tað er tað ikki sum nú er við núverandi tøkni.

**Nútíðargerð**
Nútíðargerðin tryggjar, at KT-skipanirnar kunnu brúka tøkni, sum nú er tøk, og sum skapar ein nógv størri effektivitet og eitt nógv størri brúkaravinsemi.

Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo

**Forrætningslogikkur**
Her er talan um, hvussu KT-skipanirnar eru samansettar við reglum, krøvum og mannagongdum, sum stýra, hvussu ein skipan skal virka, rokna og so víðari eftir galdandi lógum. Tað vil siga, hvussu loysnirnar eru hugsaðar og samansettar, og hetta krevur serligt innlit og yvirlit av teimum, sum gera skipanirnar.

**Backend**
Backend svarar á ein hátt til maskinrúmið ella kjarnuna í KT-skipanini. Tað er her forrætningslogikkurin (sí omanfyri) í stóran mun er skipaður omaná dátugrunnarnar.

**Agil projektstýring**
Hetta er ein projektstýringarleistur har ment verður tað sum hevur størst virði innan settu karmarnar, tíð og pengar. Ment verður í tøttum samstarvi við brúkaran og áhugabólkar, so tey fáa størst hugsandi ávirkan. Økt vitan gerst leypandi virkin partur av menningar-arbeiðinum, og menningartilgongdin gerst sera smidlig. Arbeitt verður við smærri bitum (sprint) og leypandi verksetingum.

Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo